# Sambýlið Blikagøta – Samandráttur frá eftirlitinum

Sambýlið á Blikagøtu er ein vardur bústaður, sum veitir tænastur til vaksin við menningartarni og fjølbreki. Endamálið er at tryggja, at húsfólkini kunnu liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív, har tey fáa persónliga røkt, vegleiðing og hjálp til uppgávur í gerandisdegnum so sum matgerð, reingerð og umsiting av fíggjarviðurskiftum.

**Ætlan og virkisætlan**
Skjøl vísa ætlanir fyri hvønn einstakan. Virkisætlanir hava mál og lutmál, sum strembað verður eftir at røkka, og greitt verður frá, hvussu áhaldandi eftirmeting og tillaging verða gjørdar til virkisætlanirnar. Somuleiðis kann sigast, at innihaldið í virkisætlanunum hóskar seg væl til námsfrøðina á sambýlinum.

**Arbeiðshættir og háttalag**
Arbeiðshættirnir eru samanhangandi og miðvísir við denti á námsfrøðilig amboð sum KRAP, SMTTE-modellið, Boardmaker og alternativt samskifti. Hetta tryggjar eitt strukturerað arbeiðslag, sum hóskar seg væl til málbólkin. Tó vantar vitan um alternativt samskifti hjá teimum við fjølbreki, men ein ætlan eru løgd um hetta. Fundarskipanin er eisini eitt øki, sum eigur at verða umrøtt.

**Trivnaður og menning hjá borgarum**
Húsfólkini siga, at tey trívast sum heild væl á sambýlinum og kenna seg trygg við starvsfólkini. Avvarðandi halda, at trivnaðurin er ójavnur, og trivnaðurin er ójavnur gjøgnum vikuna. Nógv verður gjørt fyri at menna førleikar hjá húsfólkunum í gerandisuppgávum, men avmarkingar í starvsfólkatali gera, at mann ikki megnar alt.

**Fakliga arbeiðið hjá starvsfólkum**
Starvsfólkini hava viðkomandi námsfrøðiligar førleikar og arbeiða væl innan fakligu karmarnar, men á sambýlinum vanta heilsufaklig starvsfólk – serliga til húsfólk við fjølbreki. Verandi starvsfólk hava fingið grundleggjandi upplæring í KRAP og luttikið í onkrari supervisión.

**Leiðsla og organisatión**
Leiðslubygnaðurin er skipaður við týðiligum ábyrgdarbýti millum eindarleiðslu og staðbundna leiðslu. Eindarleiðarin tryggjar, at sambýlið fylgir námsfrøðiligu strategiini og stuðlar leiðsluni á staðnum í at hugsavna seg um viðkomandi amboð, so sum KRAP og virkisætlanir. Staðbundni leiðarin hevur gjørt stórt arbeiði við virkisætlanum, sum virka væl á sambýlinum, og hann hevur fingið eitt gevandi samstarv í lag við Mýrisóljuna. Tó hevur staðbundna leiðslan avbjóðingar við at vera nóg sjónlig og avgerðarfør í gerandisdegnum.

**Tilmælir og áheitanir frá eftirlitinum**
Í sambandi við eftirlitsvitjanina gav Eftirlitið Almannaverkinum fylgjandi tilmælir:

*Mælt verður til, at starvsfólkatrotið, ið hevur verið, verður kannað, og um tað enn vanta starvsfólk.*

*Mælt verður til at starvsfólk og leiðari tosa saman um, um ymiskt á starvsfólkafundunum kann gerast betri.*

*Tað verður mælt til at kanna trivnaðin hjá øllum húsfólkum gjøgnum vikuna. Somuleiðis verður mælt til, at starvsfólkahópurin fær eina tilgongd um tað góða samskiftið við avvarðandi, og at avvarðandi partvíst eru við hesi tilgongd.*

*Mælt verður til, at gera alt fyri at fáa heilsustarvsfólk sett í starv og at fáa niðurskrivað eina innleiðsluætlan til øll nýggj starvsfólk.*

*Mælt verður til at starvsfólkini fáa týðiligari leiðslu.*

**Viðmerkingar frá Almannaverkinum**
Síðani eftirlitið hevur verið, hava vit søkt eftir heilsustarvsfólki tríggjar ferðir, men eingin umsøkjari hevur verið. Vit hava tí gjørt tað, at umleggja manglandi starvið, soleiðis at onkur starvsfólk taka fast vaktir afturat, og at restin verður dekkað við tímaløntum. Viðmerkjast skal, at hetta er eitt farloyvisstarv. Tá ið vit aftur fara at søkja, fara vit at søkja eftir einum heilsustarvsfólki.

Vit fara í holt við at gera eina innleiðsluætlan til nýggj starvsfólk.

Starvsfólkafundirnir eru farnir frá at vera fjórðu hvørja viku til at vera triðju hvørja viku.
Síðani eftirlitið hevur verið, hava vit skipað tiltøk fram í tíð. T.d. túrar, biograf, sjónleik o.s.fr. Hetta meta vit, hevur betrað um trivnaðin. Okkara fatan er nú, at øll trívast. Sambýlið sendir nú kunnandi teldupost til avvarðandi um tiltøk, ið eru á skrá. Ætlanin er at halda fram við hesum.

Eisini hava vit havt sálarfrøðing inni til supervisjón í sambandi við truplar samrøður við avvarðandi.
Harafturat er ætlanin, at øll bútilboðini í eindini menningartarn fara at stovna avvarðandi- og borgararáð í mars í ár. Hetta verður eisini gjørt í Blikagøtu.

Vit fara eisini at hava teir árligu avvarðandi fundir áðrenn summarfrítíðina, har vit fara at gera fundarskránna meira greiða fyri kontaktfólkini, soleiðis at tey m.a. koma at tosa um, hvussu virkisætlanirnar hjá tí einstaka húsfólkinum sær út. Hendan mannagongdin er í tí nýggju starvsfólkahondbókini, sum er fyri alla eindina. Hendan hondbókin er tikin upp við starvsfólkini síðan eftirlitið hevur verið. Harafturat fara vit eftir tørvi at bjóða avvarðandi inn til fleiri avvarðandi fundir.

Viðvíkjandi tilmæli um týðiligari leiðslu er at siga, at leiðarin fer at hugsavna seg meira um at fylgja við, um vaktir mangla at vera mannaðar í arbeiðsætlanini. Hugt verður eisini eftir, um til ber at ávísar vaktir seinnapart kunnu umskarast.

Leiðarin hevur tikið starvsfólkahondbókina upp við starvsfólkini, so uppgávan verður greiðari, og leiðarin fer eisini at koma oftari á staðið, eisini um kvøldið, og fer at nýta skjalfest og/ella teldupost til neyðuga kunning til starvsfólk. Farið verður undir at arbeiða við at fáa strategiina hjá Almannaverkinum og eindini niður til starvsfólkini. Leiðarin fer at gera eina meira skipaða upplæring og fer at vera meira tilvitaður um at veita supervisjón eftir tørvi.

Fyri at tryggja framhaldandi innihald til húsfólk í vikuskiftum, fer leiðarin at arbeiða fram í móti einum týðiligari ábyrgdarbýti í vikuskiftisvaktunum.

*Eingin beinleiðis áheitan verður givin um, at nakað er kritiskt og skal fáast í rættlag beinanvegin.*